7

# ALMANNA – OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Landsstýrismálanevndin
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
100 Tórshavn

21. mai 2008
Mál: 0.01-200800266/14
Tygara skriv:7.13-20080006
Viðgjørt: BS/sed

**Viðvíkjandi gjaldi frá yvirlæknum fyri høli og annað í sambandi við privata viðtalu hjá yvirlæknum**

Við skrivi, sum er dagfest 7. apríl 2008 hevur landsstýrismálanevndin, sent skriv frá Kára á Rógvi løgtingsmanni, til ummælis hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum og harumframt hevur nevndin biðið um innlit í skjølini í málinum sum heild.

Sagt verður frá, at Almanna- og heilsumálaráðið hevur sent skrivið til viðmerkingar hjá sjúkrahúsunum, og samtíðis biðið tey um at senda inn viðkomandi tilfar, sum er viðlagt, saman við tilfari frá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Viðmerkjast skal, at orsakað av, at skjølini eru journaliserað í ymiskum málum er fyrivarni tikið fyri, at okkurt tilfar kann vanta í. Um Landsstýrismálanevndin gerst varug við, at skjøl vanta, kann hon venda sær til Almanna- og heilsumálaráðið.

1. Reglugerð um privata viðtalu hjá yvirlæknum innan sjúkrahúsverkið og avtala um privata serlæknaviðtalu á Landssjúkrahúsinum frá 1. september 1992.

2. Aftale mellem Fíggjarmálaráðið og Serlæknafelag Føroya, har heimild finst fyri at hava privat virksemi, henda avtala er frá 2005. Aftale vedrørende lægelige chefer frá 2002.

3. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 1999. Víst verður til reglugerð um privata viðtalu hjá yvirlæknum innan sjúkrahúsverkið frá 1. september 1992.

4. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 2000.

5. Skriv frá læknastjóranum á Landssjúkrahúsinum 26. september 2001, viðvíkjandi "Overlæge- og speciallægepraksis", viðlagt er skriv frá Landssjúkrahúsinum til allar yvirlæknar. Innanhýsis notat frá starvsfólkadeildini í Almanna- og heilsumálaráðnum til aðalstjóran. Svar frá Almanna- og heilsumálaráðnum til Landssjúkrahúsið.

6. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 2001. Trivnaðarmálaráðið skrivar til grannskoðaran, at tað fer at taka málið upp við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

22. MAJ 2008
Løgtingið j. nr. 7.13-20080006

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: ahr@ahr.fo

7. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 2002. Í framhaldi av tí biður Familju- og heilsumálaráðið sjúkrahúsini um frágreiðing og yvirlit yvir avtalur, sum eru galdandi á økinum. Viðmerkingar frá sjúkrahúsunum eru hjálagdar.

8. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 2003. Almanna- og heilsumálaráðið biður Landssjúkrahúsið um eina frágreiðing í skrivi, sum er dagfest 22. oktober 2004. Í skrivi, sum er dagfest 13. desember 2004, sendir Almanna- og heilsumálaráðið Landssjúkrahúsinum áminning um svar. Landssjúkrahúsið svarar aftur 31. januar 2005, har sagt verður frá, at talan er um trupult mál, og víst verður til skriv frá læknastjóranum frá 2001, sí punkt 4 omanfyri. Landssjúkrahúsið greiðir frá, at tað hevur ikki orku til at taka málið uppaftur nú. Svar frá Almanna- og heilsumálaráðnum, dagfest 23. juni 2005 har mint verður á, at málið hevur skund.

9. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 2004. Teldupostsamskifti við Landssjúkrahúsið í november 2005, har Landssjúkrahúsið kunnar um, at einki nýtt er hent í málinum. Viðmerkingar dagfestar 14. november 2005 frá Almanna- og heilsumálaráðnum til SPEKT um grannskoðan av Landssjúkrahúsinum.

10. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 2005. Skriv frá Almanna- og heilsumálaráðnum til Landssjúkrahúsið, sum er dagfest 21. desember 2006, har Landssjúkrahúsið verður biðið um at greiða frá, hvat fyri ætlanir Landssjúkrahúsið hevur.

11. Viðmerking frá KPMG í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar sjúkrahúsi og Klaksvíkar sjúkrahúsi fyri ársroknskapin fyri 2006. Skriv frá Almanna- og heilsumálaráðnum til Landssjúkrahúsið, sum er dagfest 21. desember 2006, har Landssjúkrahúsið verður biðið um at greiða frá, hvat fyri ætlanir Landssjúkrahúsið hevur.

12. Skriv frá Landsgrannskoðanini frá 25. juni 2007, viðvíkjandi grannskoðanarfrágreiðing viðvíkjandi Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi.

13. Samskifti millum Almanna- og heilsumálaráðið og sjúkrahúsini, har spurt verður um, hvør støðan er í málinum.

14. Svar til Landsgrannskoðanina, sum er dagfest 31. august 2007.

15. Frágreiðing frá Landsgrannskoðanini send Almanna- og heilsumálaráðnum til viðmerkingar.

16. Samskifti við Oyggjatíðindi, har Oyggjatíðindi biður um alment innlit í málið.

17. Teldupostur til sjúkrahúsini, har biðið verður um viðmerkingar til skrivið frá landsstýrismálanevndini, umframt at biðið verður um alt tað tilfar, sum er viðkomandi fyri málið.

18. Tilfar frá Suðuroyar sjúkrahúsi.

19. Tilfar frá Klaksvíkar sjúkrahúsi.

20. Tilfar frá Landssjúkrahúsinum.

Vísandi til viðmerkingar frá sjúkrahúsunum, so hevur Klaksvíkar sjúkrahús í dag ongar avtalur við yvirlæknar um privatar viðtalur. Tað er ein villa, at viðmerkingin stendur í grannskoðanarfrágreiðingini hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi. Suðuroyar sjúkrahús hevur tveir yvirlæknar, hesir báðir hava avtalu um privata viðtalu. Sambært Suðuroyar sjúkrahúsi gjalda tey einans fyri leigu av hølum. Sambært Landssjúkrahúsinum er nógv av tí privata virkseminum minkað. Royndir hava víst, at trupulleikar eru tengdir at, at royna at broyta hetta økið. Landssjúkrahúsið vísir til álitið um Framtíðar heilsuverk, har lagt verður upp til at fáa greiðari skilnað ímillum alment og privat virksemi.

Víst verður til næstseinasta reglubrotið í skrivinum frá Kára á Rógvi til Landsstýrismálanevndina, har hann vísir á, "..at samstundis sum kr. 1.300.000 verða goldnar út eyka í yvirtíð til yvirlækna..". Til hetta hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum at viðmerkja, at inntil á heysti 2005, var tað ikki ásett í sáttmálanum hjá yvirlæknum, hvussu yvirtíð skuldi handfarast hjá yvirlæknum. Í sáttmálanum sum kom í gildi í 2005, varð hetta ásett, og sostatt kundi Landssjúkrahúsið gjalda út yvirtíð, ið var savnað yvir fleiri ár hjá yvirlæknunum. Landssjúkrahúsið metti ikki, at tað kundi alt fíggjast innan verandi játtan, og tí varð søkt um eykajáttan til ein part av útreiðslunum. Hetta hevði sostatt einki við privatar avtalur hjá yvirlæknum at gera. Orsøkin til, at hetta ikki varð útgoldið í 2005, var, at endaligar avtalur við yvirlæknar um útgjalding og avspáking ikki var gjørd, og tí var ov seint at søkja um eykajáttan til endamálið, ella leggja upp fyri tí á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006.

Almanna- og heilsumálaráðið

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður

/

Poul Geert Hansen
aðalstjóri